# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Fangalegan í Guantanamo hevur givið USA eitt so ringt umdømi, at vit eiga at lata hana aftur*
*(Micheal Mullen generalur)*

# Aftur saman við Emmanuel

**Clara Rojas fekk ein son við einum av sínum burturflytarum, meðan hon sat fangi í frumskóginum. Í gjár sá hon sonin aftur**

Í síðstu viku sluppu Clara Rojas og Consuelo Gonzalez frá sínum burturflytarum í Kolumbia, og í gjár slapp Clara at síggja sín trý ára gamla son, sum hon ikki hevði sæð í meiri enn tvey ár.

Clara fekk sonin saman við einum av sínum burturflytarum. Tá hann var átta mánaðir, tóku burturflytararnir hann frá henni, og hon sá hann ikki aftur. Ikki fyrr enn á nýggjárinum fekk hon at vita, at sonurin var á lívi. Tað vísti seg, at burturflytararnir høvdu latið eini bóndahjún fostra drongin, men at hann var vorðin so sjúkur, at hjúnini høvdu verið á einum sjúkrahúsi við honum. Tá hann var vorðin frískur, tók almenna barnaverndin sær av honum.

Í gjár var Clara Rojas á barnaheiminum í Bogotá, og har sá hon sonin aftur.

Myndugleikarnir hava sagt henni, at hon fær sonin, men at hann fyrst skal læra seg at kenna mammu sína og tær nýggju umstøðurnar.



*Clara Rojas og Emmanuel, sum hon ikki hevði sæð, síðani hann var átta mánaðir*
*(Mynd: Polfoto)*



*Franciska Rogne er horvin í Kashmir-fjøllunum*
*(Mynd: Aftenposten)*

# Norsk kvinna í Kashmir

**Í eina viku hava bjargingarlið leitað eftir teirri 26 ára gomlu Francisku Rogne í fjøllunum í Kashmir, men til fánýtis**

Í gjár leitaðu bjargingarmenn við servandum hundum, men heldur ikki teir kundu finna ta 26 ára gomlu kvinnuna.

Franciska Rogne fór eina skíferð niðan í fjøllini í Gulmarg í Kashmir seinasta týsdag, men hon kom ikki omanaftur. Síðani hava bjargingarlið leitað eftir henni, men higartil utan úrslit. Í gjár søgdu indisku myndugleikarnir, at teir hava smáar vónir um at finna kvinnuna aftur á lívi.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at leitað verður eftir Franciscu Rogne. Í fjør tók eitt skalvalop hana og tvey vinfólk hennara, og ikki fyrr enn seks dagar seinni vórðu tey funnin aftur.

# Drápsmaður vorðin ráðharri



*Vitalij Kalojev gjørdist hetja eftir at hava myrt danska flúgvileiðaran Peter Nielsen, og nú er hann vorðin ráðharri*
*(Mynd: Polfoto)*

**Russarim Vitalij Kalojev misti konu og børn í einari flogvanlukku. Sum hevnd myrdi hann flúgvileiðaran. Nú er hann vorðin ráðharri**

Í 2002 stoyttu eitt russiskt ferðamannaflogfar og eitt týskt flutningsflogfar saman 11 kilometrar uppi yvir Boden-vatninum á markinum millum Týskland og Sveis.

Í vanlukkuni misti russarin Vitalij Kalojev konuna og báðar døturnar, sum vóru fýra og ellivu ára gamlar. Hann gjørdist frá sær sjálvum og fór til Sveis, har hann myrdi danska flúgvileiðaran Peter Nielsen, sum hevði havt vakt í eftirlitstorninum, tá vanlukkan hendi.

Vitalij Kalojev fekk átta ára fongsul, men seinni varð revsingin broytt, og í heyst slapp hann leysur. Í Moskva fekk hann eina stórfingna móttøku, og í heimlandinum Norður Ossetia bleiv hann mettur sum hetja. Nú er hann tilnevndur vararáðharri í byggimálum, skrivar svenska Aftonbladet.

## STUTT SAGT

### Bók um Clintonhjúnini

Rithøvundurin Tina Brown, sum skrivaði ævisøguna hjá Dianu prinsessu, er nú í ferð við at skriva eina bók um Bill og Hillary Clinton. Fleiri bøkur eru skrivaðar um Clinton-hjúnini, men Tina Brown sigur, at hennara bók fer at viðgera teirra politiska og samfelagsliga virksemi heldur enn ymisk persónlig viðurskifti, soleiðis sum summir aðrir høvundar hava gjørt. Ævisøgan, sum Tina Brown skrivaði um Dianu prinsessu, og sum kom út í fjør, fekk sera góða móttøku og er seld í meiri enn 300.000 eintøkum, skrivar blaðið The New Yorker, sum Tina Brown fyrr hevur arbeitt hjá.

### Deyðadómur úr gildi

Í Týsklandi hava myndugleikarnir ógildað deyðadómin, sum tann 24 ára gamli niðurlendingurin Marinus van de Lubbe fekk fyri at hava selt eld á Ríkisdagin í Berlin tann 27. februar í 1933. Adolf Hitler var vorðin ríkiskanslari stutt frammanundan, og hann brúkti eldsbrunan sum umbering fyri lógum, sum millum annað settu tali- og pressufrælsið úr gildi. Marinus van der Lubbe bleiv hálshøgdur í Leipzig tann 10. januar í 1934. Í 1967 gjørdu týsku myndugleikarnir av at broyta dómin til átta ára fongsul. Nú er revsingin so ógildað við teirri grundgeving, at rættarmálið fór ikki rætt fram, og at Marinus van der Lubbe bleiv dømdur eftir einari lóg, um bleiv sett í gildi við afturvirkandi gildi.

### Flogferð til pólin

Eitt felag í Avstralia er farið undir ferðafólkaflúgving til Antarktis. Upprunaliga skuldi flogfarið flyta vísindafólk aftur og fram, men nú fáa onnur hvøi til at vitja íslandið. Tann fyrsti túrurin var um vikuskiftið. Tað er umráðandi at hugsa um umstøðurnar, tí tá flogfarið fór úr Avstralia, vóru 30 hitastig har, og tá tað lendi á Antarktis, vóru 17 kuldastig.